Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	28.02.2024
Mál nr.:	23/18675
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	23.01.2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.
(Avtøka av kærunevnd trygdargrunsins)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, verður § 9, stk. 1 orðað soleiðis:
“Grunnurin verður umsitin av TAKS. Avgerðir, sum TAKS tekur, kunnu innan 4 vikur eftir at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Føroya Kærustovn.”

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Kæra send til kærunevnd trygdargrunsins, sum ikki er avgreidd, tá ið henda løgtingslóg kemur í gildi, viðger og avgreiðir Føroya Kærustovnur sambært reglunum í løgtingslógini um Føroya Kærustovn.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Løgtingið samtykti í november 2021 uppskot til løgtingslóg um Føroya Kærustovn.

Endamálið við løgtingslógini um Føroya Kærustovn er at skipa kærustovnin sum sjálvstøðugan og óheftan myndugleika. Hetta hevur havt við sær, at meira enn 10 kærunevndir og aðrar nevndir eru tiknar av yvir eitt ávíst áramál og virkisøkið flutt til Føroya Kærustovn.

Tað eru tó eisini aðrar kærunevndir, har Føroya Kærustovnur ikki hevur verið skrivstova. Ein teirra er kærunevnd trygdargrunsins. Hendan kærunevnd hevur seinastu árini havt sera fáar kærur og støðan er í so máta óbroytt.

Til tess at tryggja eina munagóða kæruviðgerð, er sambært avtalu við Føroya Kærustovn avgjørt at flyta kæruviðgerðina eftir løgtingslógini um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. til Føroya Kærustovn.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu kunnu avgerðir eftir løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. kærast til kærunevnd trygdargrunsins.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at flyta tær heimildir, sum kærunevnd trygdargrunsins hevur í dag til Føroya Kærustovn.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður kæruviðgerðin eftir løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. flutt frá kærunevnd trygdargrunsins til Føroya Kærustovn, og verður hetta gjørt fyri at tryggja eina munagóða kæruviðgerð.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar, men broytingarnar í uppskotinum eru gjørdar sambært avtalu við Føroya Kærustovn.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ávísar fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í ósamsvari við:

1) **Hoyvíkssáttmálan**

2) **Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS**

3) **Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar, og lógaruppskotið elvir ikki til nýggjar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Við uppskotinum verða heimildir kærunevnd trygdargrunsins fluttar til Føroya Kærustovn.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri plass ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við uppskotinum verða heimildir kærunevnd trygdargrunsins fluttar til Føroya Kærustovn.

Grunnurin verður umsitin av TAKS. Avgerðir, sum TAKS tekur, kunnu innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Føroya Kærustovn.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Kærur, sum eru innlatnar, men ikki eru avgreiddar, tá ið henda løgtingslóg kemur í gildi, viðger og avgreiðir Føroya Kærustovnur sambært reglunum í løgtingslógini um Føroya Kærustovni.

Fíggjarmálaráðið, 28. februar 2024

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur